STARVSLÝSING

## Leiðari til barnagarðin á Gásamýri

Søkt verður eftir leiðara til barnagarðin á Gásamýri at byrja 1. november 2007 ella skjótast tilber. Umsøkjarin skal verða námsfrøðingur. Um eingin námsfrøðingur søkir, kunnu persónar við líknandi útbúgving søkja starvið. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, partvís til leiðslu og partvís í normeringini.

**Vit ynskja at tú:**

- hevur hug og hegni at leiða, at samskipa og ert fyrikomandi
- hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu
- hevur hug til at skapa og seta dám á okkara barnagarð
- kanst arbeiða sjálvstøðugt

Í barnagarðinum á Gásamýri eru 26 børn í aldrinum 4-6 ár. Barnagarðurin er ov lítil til tørvin á ansing og tí fyrireikar Leirvíkar Kommuna bygging av nýggjum dagstovni.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 443006 ella til borgarstjóran tlf. 743006.

Umsókn við avritum av prógvum og møguligum ummælum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi hósdagin 25. oktober 2007.

Leirvíkar Kommuna
Postboks 42
520 Leirvík

www.leirvik.fo

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42, 520 Leirvík

# Móttøka

**Fríggjadagin 19. oktober kl. 14-17**

Í sambandi við at HDYGD hevur fingið nýggjar eigarar, bjóða vit til móttøku

í nýggju høll okkara í Miðvági
fríggjadagin 19. oktober kl. 14-17,

har høvi verður at heilsa uppá gomlu og nýggju eigararnar.

Hjartaliga vælkomin.

REPROZ

**HDYGD**

HDYGD | Í GEILINI 2 | FO-385 VATNSOYRAR | FAROE ISLANDS
Tel.: +298 332177 | Fax: +298 333166 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

Spennandi og avbjóðandi starv sum

# Marknaðarleiðari hjá Atlantic Airways

Atlantic Airways skal hava nýggjan marknaðarleiðara.

Leiðarin hevur ábyrgdina av allari marknaðarføring og sølu hjá felagnum og skal í samstarvi við stjórn felagsins menna eina marknaðar- og sølustrategi, ið skal tryggja at felagið framhaldandi mennist. Marknaðarleiðarin verður partur av leiðslubólkinum og skal saman við hesum vera við at tryggja kappingarføri felagsins.

Marknaðarleiðarin hevur ta strategisku menningina av deildini um hendi, skal leggja ætlanir fyri átøk, implementera verkætlanir, røkja samskifti við viðskiftafólk, røkja og menna samskiftið við samstarvsfelagar heima og uttanlands.

Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur innlit og royndir innan vinnugreinina, altjóða royndir, og hevur útbúgving innan marknaðarføring og sølu.

Viðkomandi skal hava góð evni at samskifta, bæði í skrift og talu, hava góð evni at skapa og viðlíkahalda netverk, umframt duga at síggja góðar inntøkumøguleikar.

Talan er um eitt krevjandi men spennandi, avbjóðandi og mennandi starv. Neyðugt er at hava hug og umstøður til lutfalsliga nógva ferðing uttanlands.
Lønin verður ásett eftir avtalu.

Um fleiri upplýsingar ynskjast, kanst tú venda sær til Magna Arge, stjóra, tel 341000, magni@atlantic.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. oktober 2007, og skal sendast til:

Atlantic Airways
Starvsfólkadeildin
FO-380 Sørvágur

sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka, hvørs virkismentan er eyðkend av, at fokus altíð er á trygd, stundvísi, kundan og úrslitið. Umleið 200 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, sum hevur heimstað í Sørvági. Árligi umsetningurin í 2006 var 519 milliónir krónur.
Atlantic Airways hevur fimm flogfør og tríggjar tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi og Noregi. Harumframt er virksemi víðfevnt í øðrum londum við leiguflogførum, og umleið helvtin av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrludeildin røkir ferðasamband til útoyggjarnar, leiti- og bjargingartænastu og off-shore flúgving í Norðurhøvum.

Tel 34 10 00 · Faks 34 10 01 **ATLANTIC AIRWAYS** atlantic.fo